TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 15. november 2001 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin, at ein partur av D3 umráðispartinum, kannað stórum almennum stovnum fyri umsiting, heilsurøkt og tílikt, uppi á Hálsi, vestan fyri R.C. Effersøesgøtu, verður broytt til A1 sethúsaøki.

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá fríggjadegi 7. desember til og við 4. januar 2002, allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 8. mars 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 29. november 2001 samtykti broytingar í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

Ætlaða broytingin er, at eindin C4, sum er kannað almennum stovnum og skrivstovum, verður broytt til eisini at umfata bústaðarendamál.

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá fríggjadegi 7. desember til og við 4. januar 2002, allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 8. mars 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 2. februar 2001 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin, at B4 økið við Oyggjarvegin verður víðkað vestureftir frá matr. nr. 1175 c, Tórshavn, við uml. 6.500 m .

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá fríggjadegi 7. desember til og við 4. januar 2002, allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 8. mars 2002.

SNARSKIVAN

Suðuroyar Ellis- & Røktarheim
800 Tvøroyri

Almanna- og heilsuatstøðari

Vegna farloyvi verður søkt eftir almanna- og heilsuatstøðara til fulltíðarstarv í skiftandi vaktum í tíðarskeiðnum frá 1. januar 2002 til 30. september 2002.

Løn og setanartreytir sambært Fíggjarmálastýrið og Almanna- & Heilsurøktarfelagið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 371666 lokal 147.

Umsókn við avriti av prógvum verða sendar til:

Suðuroyar Ellis- & Røktarheim
Postsmoga 51
800 Tvøroyri

innan 20. desember 2001.

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Avgreiðslufólk

Søkt verður eftir avgreiðslufólki til skrivstovu stovnsins á Lambareiði.
í høvuðsheitum fevnir arbeiðið fyrst og fremst um post- og telefonavgreiðslu og kundatænastu annars.
Eisini er nakað av skrivstovuarbeiði, so sum brævaskriving, lønarskráserting o. t. og ymiskt fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni.

Vit ynskja at viðkomandi skal verða fyrikomandi og hava góð samstarvsevni.

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Umsókn verður at senda Landsverkfrøðinginum, postboks 78, 110 Tórshavn, innan 20. desember 2001.

Upplýsast kann, at skikkaður umsøkjari er til starvið.

Tvey størv í

Sands Kommunu

Sands kommuna søkir eftir:

1 havnaumsjónarfólki
1 kommunuumsjónarfólki

Bæði størvini eru fulltíðarstørv og verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Størvini verða sett við eini royndartíð uppá 1 ár.

Innihaldið í størvunum verður skipað í neyvum samstarvi við Sands kommunu í royndar tíðarskeiðinum.

Havnarumsjónarfólkið hevur fulla ábyrgd av dagliga rakstrinum av Sands havn, mótvegis borgarstjóranum, herundir røkt av ogn og arbeiðir, ið hoyra Sands havn til. Harafturat hevur havnaumsjónarfólkið dagliga ábyrgd av ruskplássinum og tjaldøkinum hjá Sands kommunu.

Kommunuumsjónarfólkið hevur ábyrgdina av viðlíkahaldi av ognunum hjá Sands kommunu og samskipanina av tí fyrifallandi arbeiðinum hjá kommununi.

Dentur verður lagdur á at havna- og kommununumsjónarfólki samstarva væl, við trivnaði og góðum umhvørvi fyri eyga.

Umsóknir skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 20. desember 2001 kl. 12.00.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til borgarstjóran á **tlf. 211930**.

Sands Kommuna

Frá

Sjúkrakassa Fuglafjarðar Læknadømis

Sagt verður limunum frá, at limagjaldið verður kr. 200 kr. um mánaðin frá 1. januar 2002.

Sjúkrakassi Fuglafjarðar Læknadømis

Fólk søkist

til grillbar, skiftandi og fastar vaktir at velja ímillum.

Grill 2000
Per Mohrsvegur 7
Tlf. 322003 – 213388

KT fólk

Dátufrøðingur, verkfrøðingur, landmálari a.l.

Søkt verður eftir fólki at byrja 1. januar 2002 ella skjótast gjørligt.

Arbeiðsuppgávur

Tann, ið settur verður, fer at taka lut í rakstri og menning av nýtsluskipanum og útbúnaði, at veita brúkanum og viðskiftafólki ráðgeving og at vera við í søluarbeiði.

Kjarnin í virki felagsins er kort- og geodátusavnið, og høvuðsuppgávan í so máta verður at endurnýggja savnið við myndakortum og við sonevnda FDS-kortinum.

Virksemið fevnir eisini um rakstur av øðrum dátuskipanum og internettænastum, og har aftur at um umsiting av net-útbúnaði og ambætarum.

Førleikakrøv

Søknast verður eftir dátufrøðingi, verkfrøðingi ella landmátara, men ommur, sum hava lug og hegni til teld og at arbeiða við kortum og skrásetingum annars, eiga ikki at halda seg aftur.

Kunnleiki til Unix, Linux, Windows, Oracle, tekniformit (MicroStation) og lendislýsingar (GIS) er avgjørt til fyrimuns.

Setanartreytir

Løn og setanartreytir samsvarandi førleikanum.

Umsóknir

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 17. december 2001.

Ring ella støkk inn á gólvið at frætta nærri um starvið.

FØROYA DÁTUSAVN pf
Tinghúsvegur 9, Postboks 255, 110 Tórshavn
Tlf 318200, fax 218201, fax 319285
e-postur fds@fds.fo heimasíða www.fds.fo



KPMG

Verkfrøðingur
til arbeiði innan HVS og ventilatión

Orsakað av vaksandi virksemi verður søkt eftir verkfrøðingi til arbeiði innan HVS og ventilatión til P/F Demich.

Starvið
Talan er um eitt spennandi og avbjóðandi starv, har tú m.a.:
- skalt stýra tí fíggjarliga og umsitingarliga undir projekterings- og uppsetingarstigunum
- kemur at brúka framkomnar edv-skipanir sum arbeiðsamboð
- kemur at taka tær av øllum fyrifallandi arbeiði innan HVS- og ventilatiónsarbeiði

Umsøkjarin
Dentur verður lagdur á, at tann ið settur verður:
- er útbúgvin verkfrøðingur
- hevur førleika til at síggja nýggjar møguleikar innan arbeiðsøkið
- hevur evni at loysa krevjandi uppgávur
- hevur áhuga og førleika í at brúka IT sum part av arbeiðsamboðunum
- er tilvitaður um góðsku

Eisini skal viðkomandi hava góð samstarvsevni, verða fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí.

Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

Umsóknin
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber ella í seinasta lagi 1. januar 2002.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Rúna Poulsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

Nýtt Nýtt...

Grill 2000 er opnað.
Í tí sambandi hevur Video 2000
tilboð allan desember mánað

Leiga 1 film fyri 25,-
ella
leiga 3 filmar fyri 60,-

Video & Grill 2000

Per Mohrsvegur 7
188 Hoyvík
Tlf. 322003 · Fax 316290

Lesið internet Sosialin !



Alt
- til skrivstovuna

- Brævordnarar
- Kopipappír
- Skiljibløð
- Pennar o.a.

Tað, sum vit ikki hava á goymslu, fáa vit til vega skjótt

Sp/f J.D.Hammer
800 Tvøroyri
Tlf. 372198 · Fax 371198

Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins verður leygardagin tann 23. februar 2002 kl. 14.00 á Hotel Hafnia.

Uppskot til viðgerðar á aðalfundinum og uppskot til formansvalevni, skulu **skrivliga** sendast

Havnar Arbeiðskvinnufelag
postsmoga 161
110 Tórshavn

áðrenn 1. januar 2002.

Saman við uppskotum til formansvalevni skal verða skrivlig váttan at viðkomandi stillar upp.

Nevndin